# Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 7. juni 2024 |
| Mál nr.: | 24/10183 |
| Málsviðgjørt: | AP |
| Ummælistíð: | |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð um landsvegaskrá

Við heimild í § 1, pkt. 3 og 4 í løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972, verður ásett:

**§ 1.** Vegastrekkini, sum eru ásett í §§ 2-11 eru at rokna sum landsvegir.
*Stk. 2.* Um ein landsvegur endar við einari brúgv tvørtur um eina á, gil ella gjógv, hoyrir brúgvin við til landsvegin.
*Stk. 3.* Endar ein vegur við vendipláss, bussteðgipláss ella parkeringsøki, og annað ikki er tilskilað, hoyra tey við til landsvegin.

*Suðuroy*

**§ 2.** Frá omankoyringini til Pollin í Sumba gjøgnum Sumbiartunnilin vestan fyri Lopra til vegamótið við Báraldarbakka í Vági við hesum teymum:
1) Úr Lopransdali eftir gamla Sumbiarvegnum til mótið millum lendingarvegin og vegin yvir í Hamrabyrgi í Víkarbyrgi.
2) Úr Lopransdali til áraka Akratanga á Økrum.
3) Vestanífrá til marknagarðin í Ónavík í Lopra.

*Stk. 2.* Frá markinum millum Toftahaga og Neshaga í Vági, gjøgnum Hovstunnilin, um Ørðavík, Trongisvág, gjøgnum nýggja Hvalbiartunnilin um Hvalba til ánna í Hvilvt í Sandvík við hesum teymum:
1) Til Nes, Vági.
2) Sunnanífrá til vegin niðan á Heyggj í Porkeri.
3) Norðanífrá til vegamótið við kirkjuna í Hovi.
4) Til vegamótið við Fløguveg í Fámjin.
5) Til ferjuleguna á samferðsluhavnini á Krambatanga.
6) Til bøgarðin í Fitjabyrgi í Nesi, Hvalba.

*Stk. 3.* Frá grótbrotinum á Tvøroyri út á Bø til ánna á Hamri í Froðba.

*Sandoy*

**§ 3.** Frá ferjuleguni á samferðsluhavnini í Skopun um Sand og Húsavík til Dalsá í Dali, við hesum teymum:
1) Til vendiplássið við skúlan á Skarvanesi.
2) Til vegin niðan á Gerðabrekku í Skálavík.

3) Vestanífrá til ovastu brúnna um Stórá í Húsavík.

*Vágar*

**§ 4.** Frá Dalsá í Gásadali oman fyri bygdina í Bø til vestara endan á vegnum, undir Skoragarði í Sørvági við teymi eystanífrá til vendiplássið á vegnum oman til Bíggjar.
*Stk. 2.* Úr vegamótinum Traðarbrekka, Skúlavegur og í Bygdini í Sørvági til Lambá í Miðvági við hesum teymi:
1) Inn til gamla landsvegin í Vatnsoyrum.
*Stk. 3.* Frá vestara vegnum til havnarlagið í Miðvági um Sandavág til íbindingina við Oyrargjáarvegin.

*Streymoy*

**§ 5.** Frá íbindingini Marknagilsvegur og Velbastaðvegur til ferjuleguna á samferðsluhavnini á Gomlurætt við hesum teymum:
1) Úr vegamótinum við Tróndarheygg um Velbastað til niðaru brúnna um Syðradalsá í Syðradali.
2) Úr vegamótinum oman fyri ferjuleguna á Gomlurætt til vegamótið, Kirkjubøarvegur, Ovarivegur og Gamlivegur, í Kirkjubø.
*Stk. 2.* Frá Eystara Ringvegi í Tórshavn eftir Hvítanesvegnum, um Sund gjøgnum Kollfjarðartunnilin, um Kollafjørð, Hósvík, Áirnar, Hvalvík, Streymnes, Nesvík, Langasand og Haldórsvík til Stórá í Tjørnuvík við hesum teymum:
1) Um Kaldbaksbotn til vestara hornið á matrikul nr. 30 í Kaldbak.
2) Um Oyrareingir til Tríggjaráir á Signabø.
3) Gjøgnum Hvalvík til vendiplássið heiman fyri húsini á Kvíggjarhamri í Saksun.
4) Til og við busssteðgiplássið í Streymnesi.
*Stk. 3.* Oyggjarvegurin frá Norðara Ringvegnum í Tórshavn til vegamótið við Hvilvt í Kollfjarðardali við teymi til ánna norðan fyri bygdina í Norðradali og frá hesum teymi til Marknaá á Ytru Fløtum.
*Stk. 4.* Frá rundkoyringini í Kollfjarðardali um Leynar og Stykkið til Fossá í Vestmanna við hesum teymum:
1) Gjøgnum Leynar til Mataránna á Skælingi.
2) Sunnanífrá til gilið á Kirkjujørð í Kvívík.
3) Til vegamótið Válavegur, Krókavegur og Nesvegur á Válinum.

*Streymoy – Eysturoy*

**§ 6.** Frá vegnum í Nesvík eftir brúnni um Streymin og gjøgnum Norðskálatunnilin oman til vegin millum Fjarða við hesum teymum:
1) Til Djúpagarðsá sunnan fyri Oyri.
2) Til fyrstu íbindingina á vegnum við Svartheygg, millum matrikul nr. 35g og 35m við Norðskála.

*Eysturoy*

**§ 7.** Frá rundkoyringini oman fyri Norðskála um Ljósá til gamla bøgarðin, sum er beint eftir vegbugin á Eiði við teymi til Búðaráir norðan fyri Norðskála.
*Stk. 2.* Frá vegnum oman fyri Eiði um Funning til vegamótið í Funningsfirði við hesum teymum:
1) Til ovaru innkoyringina til Gjáargarð, matrikul nr. 139a við Gjógv.
2) Til niðaru brúnna um Stórá í Funningi.
*Stk. 3.* Frá Sandá á Selatrað um Morskranes, Kolbeinargjógv og eftir nýggja vegnum um Strendur, um Skála, gjøgnum bygdina Skálafjørð til vegin millum Fjarða við hesum teymum:
1) Sunnaneftir til Gjógvará á Skála.
2) Norðaneftir til brúnna um Kumlá á Skála.
*Stk. 4.* Frá Stórá í Elduvík um Funningsfjørð, undir Gøtueiði, Skipanes, Søldarfjørð, Lambareiði og til Glyvragjógv á Glyvrum við hesum teymum:
1) Til vegamótið Víkarvegur og Ovarivegur í Oyndarfirði,

2) og frá hesum teymi til fyrsta húsið á Hellunum, matrikul nr. 931.
3) Til Stórá í Lamba.

*Stk. 5.* Frá vegamótinum Toftavegur, Agnið og Nesvegur á Nesi eftir Toftavegi um Toftir, Saltnes og Runavík til Skøtá í Æðuvík við hesum teymum:

1) Eftir nýggja vegnum til íbindingina vestanfyri matrikul nr. 191 í Rituvík
2) Um Agnið til innkoyringina til Blákrossheimið, matrikul nr. 59b, Toftir

*Stk. 6.* Frá rundkoyringini á Krossi innanfyri Søldarfjørð um Gøtugjógv og Kambsdal til Gjógvará í Fuglafirði við hesum teymum:

1) Norðanífrá til norðasta punktið á matr. nr. 144 í Syðrugøtu
2) Sunnanífrá til Eiðisá í Norðragøtu
3) Gjøgnum Leirvíkstunnilin eftir Fjøruvegi í Leirvík móti Norðoyatunlinum til markið millum matrikul nr. 426b og litra an

*Kalsoy*

**§ 8.** Frá ferjuleguni á Syðradali eftir niðara vegi um Húsar til parkeringsøkið við skúlan á Trøllanesi við hesum teymum:

1) Eftir Dalsgøtu til og við rulluportrið beint áðrenn bøgarðin á Syðradali.
2) Til brúnna um Árgil undir Brekku í Mikladali.

*Borðoy, Kunoy og Viðoy*

**§ 9.** Frá rundkoyringini við tekniska skúlan í Klaksvík yvir í Oyrarvegin til vendiplássið úti á Norðoyri.

*Stk. 2.* Frá havnarmerkinum norðan fyri í Klaksvík um Ánir og Strond, eftir byrgingini um Haraldssund og gjøgnum Kunoyartunnilin til Myllá í Kunoyar bygd við teymi til Myllá í Haraldssunds bygd.

*Stk. 3.* Frá Ánavegnum í Ánunum um Depil, Norðdepil og Hvannasund og gjøgnum Viðareiðistunnilin til matrikul nr. 110e á Viðareiði við hesum teymum:

1) Til Stórá í Árnafirði
2) Til Toftá á Norðtoftum
3) Til Matará í Múla

*Svínoy*

**§ 10.** Frá brúnni um Eiðisá á Svínoyareiðinum til matrikul nr. 150 í Svínoyar bygd.

*Fugloy*

**§ 11.** Frá túninum á Veggi á Kirkju til Húsá í Hattarvík.

*Gildiskoma*

**§ 12.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 13 frá 2. februar 2007 um landsvegaskrá.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, 7. juni 2024

**Dennis Holm**
landsstýrismaður

/ Elin Mortensen